NÁM

# Soleiðis gert tú partar av mynd gjøgnumskygdar í IrfanView

Vanliga kunnu bert tvey myndasnið gerast gjøgnumskygd. Hesi eru gif og png. Gif er tað gamla myndasniðið, ið einans kann vísa upp til 256 litir. Png er nýggjari og kann vísa nógv fleiri litir. Gif og png fylla nakað meiri enn tað vanliga myndasniði, ið er jpg, tí hesi pakka ikki myndina soleiðis, at dygdin versnar.

**1. Opna myndina tú ætlar at viðgera í Irfan View.**



**2. Lita myndina við einum sterkum liti, sum annars ikki er í myndini.**



**3. Klipp myndina inn so tætt sum tú kanst**



**4. Goym myndina sum png**

-> ”Gem som” / ”Save as” og vel fílusnið (Filtype) png. Ansa eftir at flugubein stendur í ”Save Transparent Color”. Áðrenn myndin verður goymd, biður forritið teg velja/klikkja á tann litin, ið skal gerast gjøgnumskygdur.




Er úrslitið ikki nøktandi, bagir helst okkurt við pkt. 2. Royn av nýggjum.